# Søgan hjá Bakkafrost

**1968:** Teir báðir brøðurnir, Hans og Rólant Jacobsen stovnaðu fyritøkuna Bakkafrost. Fyrsta góðskingarvirkið varð bygt sama ár. Triði bróðirin, Martin Jakobsen, kom uppí í 1971.

**1972:** Tað næsta góðskingarvirkið varð bygt á Glyvrum. Handilshugskotið var at fiska sild á firðunum í Føroyum, og selja hana sum kryddað og marinerað sildafløk.

**1977:** Farið varð undir at pakka føroyskan flatfisk til bretska marknaðin. Hetta varð gjørt fyri at tryggja fyritøkuna, tí sildaveiðan minkaði nógv tá.

**1979:** Fór, sum eitt av teimum fyrstu føroysku virkjunum, undir alivinnu.

**1980'ini:** Fór undir at svirka fars og surimi úr svartkjafti í Føroyum. Í 1990'unum minkaði svartkjaftastovnurin brádliga, og hetta førdi til at Samtakið og restin av vinnuni fekk fíggjarligar trupulleikar.

**1986:** Jón Purkhús og Heini Gregersen stovnaðu P/F Bakkafrost Holding, sum tá æt Sp/F Faroe Salmon. Teir fóru undir at ala laks og smolt.

**1992:** Regin Jacobsen, Hans Jacobsen og Martin Jakobsen umskipaðu felagið. Um sama mundið setti felagið á stovn P/F Alistøðina á Bakka. Teir høvdu loyvi at ala laks á tveimum firðum, umstøður at kryvja og viðgerða laksin á Glyvrum, førleika til pelagiska framleiðslu, eins vl og teir framleiddu styropor-eskjur at flyta fisk í.

**1995:** Virkið á Glyvrum varð umbygt til eitt góðskingarvirki til laks. Íløgan var amarkað og framleiðsluorkan lítil. Felagið fekk loyi at ala smolt á Glyvrum og í Glyvradali.

**1999-2001:** Felagið hækkaði dagligu framleiðsluorkuna til umleið 22 tons av kruvdum fiski við tveimum ymiskum íløgum, sum vórðu gjørdar um hetta mundið til tess at fáa í lag størri vøkstur.

**2006:** Í 2006 var felagið víðkað við m. a. samanleggingum, og framleiðslan vaks við 15.000 tonsum av kruvdum fiski til eina samlaða framleiðslu á 18.000 tons av kruvdum fiski. Felagið fekk loyvi at ala á seks firðum afturat og fekk tvær smoltsstøðir. Felagið gjørdi stórar íløgur í góðskingarvirkið á Glyvrum fyri at vera ført fyri at taka ímóti vaksandi nøgdunum, og virkið kláraði eina framleiðslu á 55 tons av kruvdum fiski um dagin.

**2008:** Partaeigararnir í Bakkafros og Vestlax samdust um at leggja feløgini saman. Samanleggingin skuldi verða tann 1. januar 2010. Partaeigararnir hjá P/F Vestlax Holding fingu partabrøv í Bakkafrost. Vestlax hevði eina framleiðslu á 11.000 tons av kruvdum laksi og síli og hevði eitt kryvjivirki í Kollafirði.

**2009:** Hetta árið hevði felagið metstóra framleiðslu, og nettovinningur og úrslit var eisini besta nakrantíð. Avgerð varð tikin um at skráseta felagið á Oslo Børs 2010.

# Gott úrslit hjá Bakkafrost

**VINNULÍV** Ársúrslitið hjá Bakkafrost er 259 milliónir krónur eftir skatt. Nevndin mælir til at gjalda út 191 milliónir krónur í vinningsbýti

Eirikur Lindenskov

Ársúrslitið fyri 2010 er áljóðandi 259 milliónir krónur eftir skatt. Felagið er væl konsoliderað og hevði við ársenda 2010 ein solvens upp á 76%. Rakstrarúrslitið hjá Bakkafrost fyri 2010 var 247,3 milliónir krónur, og svaraði hetta til 11,44 krónur fyri hvørt kg av laksi, sum felagið tók í 2010. Nevndin í Bakkafrost fer at skjóta upp fyri aðalfundin at útgjalda vinningsbýti upp á DKK 3,91 fyri hvørt partabrævið, svarandi til DKK 191 milliónir í alt.

Úrslitið fyri fjórða ársfjórðing 2010 er áljóðandi 114 milliónir krónur eftir skatt. Rakstrarúrslitið hjá Bakkafrost fyri fjórða ársfjórðing 2010 er áljóðandi 91 milliónir, og svarar hetta til 13,99 krónur (NOK 15,12) fyri hvørt kg av laksi, sum er tikin.

Felagið sigur í tíðindaskrivi, at biologiska gongdin er framhaldandi góð, og marknaðurin fyri laks er góður. Tøkan av laksi øktist seinasta ársfjórðingin í 2010 í mun til tríggjar teir fyrstu ársfjórðingarnar, soleiðis at felagið í alt í 2010 tók 21.626 tons av kruvdum laksi og sílum. Í 2010 setti Bakkafrost 8,2 milliónir smolt út í mun til 7 mió., sum var upprunaliga metingin fyri árið. Byrjað verður at taka henda fisk í seinnu hálvu av 2012. Í 2010 hevði Bakkafrost sløk 400 ársverk.

Felagið sigur, at útlitini fyri 2011 eru góð. Tøkan av laksi fer væntandi at verða umleið 33.000 tons, og hevur felagið longu gjørt søluavtalur fyri umleið 30 prosent av hesum. Søluavtalurnar eru viðvíkjandi portiónum, sum verða framleiddar á Glyvrum.

Í 2010 gjørdi felagið íløgur fyri umleið 70 milliónir krónur, og fara íløgurnar væntandi at verða á sama støði í 2011.

Alivinnan stóð fyri einum munandi íkasti til føroyska samfelagið í 2010. Av samlaða føroyska útflutninginum stóð alivinnan fyri 34 prosent, svarandi til 1.476 milliónir krónur, har av umsetningurin hjá Bakkafrost var 820 milliónir krónur.

– Vit eru sera væl nøgd við úrslitið fyri 2010. Biologiska gongdin er og hevur verið góð, og laksaprísurin er framhaldandi góður. Útlitini eru eisini góð, og við øktari framleiðslu í 2011 eru vit bjartskygd, samstundis sum at ein týðandi partur av umsetninginum fyri 2011 longu er seldur við góðum langtíðar kontraktum, sigur Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost.

*eirikur@sosialurin.fo*




## Fakta

Bakkafrost er størsta alifelag í Føroyum við eini ætlaðari framleiðslu á 33.000 tons av laksi í 2011. Felagið er fult integrerað frá smolti til lidnar vørur og sølu. Felagið rekur 14 aliøki á 13 ymiskum firðum og eigur 39% av aliloyvunum í Føroyum. Felagið hevur kryvjivirki í Klaksvík og Kollafirði og framleiðslu av lidnum vørum á Glyvrum. Høvuðsskrivstova felagsins er á Glyvrum, og felagið hevur sløk 400 starvsfólk.